# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

*Framhald av s. 13*

*ligan hátt og ikki sum eitt stjørnuskot!* Kortini leggur hann afturat, at *hann hálvavegna hevur givið suðuroyingum lyfti* um, at hann vil koma til Føroya, áðrenn løgtingsvalið. Og svá gjørdist! Minni enn eitt ár seinni (december 1970) varð hann løgmaður og er framvegis tann, sum avgjørt hevur sitið longst í hesum sessi.

## Musiskur politikari

*Drum Freunde reichet Euch die Hand*
*Damit es sich erneue*

Tað vildi verið órættvíst móti eftirmæli Atla, um fólk fingu varhugan av, at hann í síni útisetatíð einans fekst við prosaiskt breyðstrev og politikk. Atli var í orðsins positiva týdningi ein sannur lívsnjótari, ein *epikuræari*. Hann treivst frálíka væl við eitthvørt veitsluborð, – hann var víttfevnandi, sangvinskur og skemtandi.

Hann var ofta við til at fagna teimum nýklaktu pisunum á studentafelagsins pisuveitslum í gamla Bispakjallaranum á *Frúu plássi*, bæði við sangi, kvøðum og skemtirøðum. Hann hevði góða rødd og dugdi flestu føroysku sangir uttanat og eitt ótal av útlendskum við.

Og sjálvt um okkara studentasangur valla var merktur av *bel canto*, so var ljómurin so mikið meira merktur av eldhuga, lívsgleði og entusiasmu. Vit sungu *con fuoco*. Hetta vertsskapslív, hesa *burschenherrlichkeit* kundi Atli ikki vera fyri uttan. Tað var nostalgiski arvurin frá Herlufsholm.

Hann var við til mangt mentatiltakið í studentafelagnum. Í 1960 – hálvtrýss ára jubileumsári felagsins – var hann við til at spæla kabarett í Sjónleikarhúsinum, har hann enntá illuderaði sjálvan pápa sín.

Á litterera økinum hevði hann tríggjar avgjørdar favorittar – partamannin Heðin Brú, William Heinesen og skyldmannin Janus Djurhuus. Tað var ikki smávegis, hann kundi citerað úr *„Feðgum á ferð"* og *„Den sorte gryde"*, men allarbest dámdi honum í vertsskapi at syngja ella deklamera úr skaldskapi Janusar. Undir krígnum búði Janus á Tvøroyri, og var tíðum gestur hjá skyldmonnunum. Skaldið var hábærsligt, bergtakandi og tignarligt, men heilsan bilaði, so Atli plagdi at hava sum setning at bera kuffertið hjá Janusi av keiini og niðan. Samsýningin skuldi verða eina krónu hvørja ferð! Annars vóru tað russiskir høvundar sum *Tolstoj* og *Sjolokhov*, sum høvdu størsta áhuga hansara. Eitt nú *Krig og fred* og *Stille flyder Don*. Sosialrealistisku bókina *Kleiner Mann Was nun?* hjá Fallada hevði hann ofta á lofti og helt vera framúr væl skrivaða! Endiliga dámdi honum stak væl operettuna *Dreigroschenoper* (Leper og kloddar) hjá Bert Brecht og Kurt Weill!

## Interludium á »Mannaátaranum «

<u>*Der alten Freundschaft heilges Band*</u>
<u>*Das alte Band der Treue*</u>

Men eisini í politiskum tjaki kundi Atli vera íspegil og skemta meira enn summum lúnivættum dámdu. Eg kann t.d. nevna eina smákuriøsa hending úr studentafelagnum heystið 1960. Hetta hevði eitt sindur við altjóðapolitikk at gera. Ovasti russiski politiski oddamaðurin Nikita Khrustjov hevði stutt áðrenn á dramatiskan hátt skapað sær í ST, har hann var farin úr øðrum skónum, hevði bukað hann niður í borðið og hóttað við at blaka skógvin eftir einum av sendimonnunum, um hann ikki *„skikkaði sær"* og lat vera við at finnast at Sovjetsamveldinum. Hetta var alment kent og hevði nýliga staðið í bløðunum.

Orðaskiftið tað kvøldið var hvassari enn vanligt og sjáldsama harðrent, serliga millum javnaðarmenn og tjóðveldismenn, og sjálvandi var Nato og hervaldið á lofti. Atli hevði sum so ofta fyrr sligið fast, at javnaðarmenn vóru *Natomenn um ein háls*. Slíkar parolur dámdu ikki tjóðveldismonnum! – Professarastovan á Kannibalinum var á tremur av fólki, og formaður og orðstýrari høvdu ilt við at stjórna fundinum. So reisti Atli seg uppaftur, lat seg úr øðrum skónum, bukaði harðliga við honum og fekk steintøgn beinanvegin.. So helt hann fyri við tjóðveldismenninar: <u>*„Je brúki somu parlamentarisku metodur sum tygra maður í ST"*.</u>

Tað gjørdist øgiligt rok, og fleiri tjóðveldismenn (ikki allir kortini) blivu ovursintur og forargaðir – aðrir fingu brúnasíða gron. Slíkt kundi man ikki loyva sær, hildu teir fyri! So erkvisnir og kemiskt fríir fyri humor vóru teir tá sum nú!

Vanligt var, at menn eftir slíkar ógvisligar Kannibalfundir fóru oman á *„Det lille Apotek"* til nachspiel og eftirviðgerð. Men hetta kvøldið vóru nógvir firtnir tjóðveldismenn rýmdir til hús, tí teir toldu ikki at verða skýrdir kommunistar, og als ikki av Atla. Hetta var eitt sindur gátuført, tí nógvir teirra plagdu annars sjálvir at leggja stóran dent á, at teir *vóru* kommunistar. Onnur máttu bara ikki siga tað! Politiski logikkurin var heldur ikki sterkur tá í tíðini!

Men løtu seinni sat Atli brosandi á *„Apotekinum"*, skemtaði og sang ella hugleiddi um, hvussu stimbrandi tað ovurmentaða apotekaraumhvørvið var, har so mætir menn sum Holberg, Kierkegaard, Peter Faber og H.C. Andersen eisini høvdu hugnað sær.

*„…. í vertsskapi fróur og glaður*
*við egið sum við annans borð"*

## Eftirmæli, eftirviðgerð og eftirbilsni

<u>*Stosst an und hebt die Gläser hoch*</u>
<u>*Die alten Burschen leben noch*</u>

Tað hevur vakt miklan ans, at Atli Dam, nú hann er farin, verður so fagnaður og stórliga róstur av mótstøðumonnum – tað er sjálvandi gott – sjálvt um tað, satt at siga, er nakað seint!

Men hvussu nógv minnast í dag ta móttøku, Atli fekk, tá ið hann var komin til Føroya av álvara. Ja, tað var ikki við mýkindum! Fáur maður hevur verið so mismettur! Vælkendur politiskur oddamaður legði hann undir landasvik í EEC–málinum – hann varð skuldsettur fyri at vilja *luska* og *lirka* Føroyar inn í Felagsmarknaðin gjøgnum bakdyrnar, utan allarminsta hald í veruleikanum. Somu vitleysu fíggindamynd broderaði *fólkafylkingin* ein desperat og seinpurpertil semikommunistisk háskúlafløkja. Tey mest óerligu, grotesku og óreinu motiv vórðu líka frá 1970 til 1975 javnliga kastað Atla fyri! Tað var ikki tað politiska runublak, sum ikki varð grýtt eftir honum, serliga í tabloidblaðnum Fjúrtanda. Sólvá fekk heldur ikki frið – hon varð saman við Atla jagstrað av einum talentleysum tjóðveldispolitikara í fleiri ár fyri, at tey ikki skuldu vera *gift* (!!!), og tað blandaði hesin ússaligi kannustoypari uppí EEC–málið! Næstan hvør debattfundur bleiv forgiftaður av *„giftarmálinum"*, hann hevði krøkt seg uppí. So „høgt" var klombruta tjóðveldisflogið *eisini* tá!

Táverandi sambandsblaðið Dimmalætting hevði heldur ikki nógv høgv. Teir samanbóru menniskjansligu og demokratisku sjónarmið Atla í abort-spurningum við mansmorð! Vit javnaðarmenn hava aldri verið nógv fyri *privatisering*, men vit fara kortini altíð at halda, at allar lívmøður skulu privatiserast, og eingin fariseari, heldur eingin politikari skal blanda seg uppí hvørja avgerð, kvinnur taka í abortmálum!

Í Molsbáta-málinum náddi hysteriski ágangurin móti Atla olympiskum metum! Tað er tankavekjandi at gera analogiskar metingar við Norrønu, sum menn nú kanska eru farnir at avreiða til Íslands!

Men sum frá leið, erkendu tey flestu, um enn við ringum tannabiti, at tað var einki alternativ til Atla í føroyskum politikki. Hann var í politiskum serklassa, ikki minst, sum maðurin, ið fekk konstruktivar loysnir í lag. Sum samráðingarmaður, ikki minst í uttanlandsmálum var hann genialur. Fysiskt spardi hann seg aldri! Hann noyddist við fugladúr! Tol, seiggi og treiskleiki góvu frálíka góð úrslit! Her bregðaði hann ikki burtur úr ætt!

<u>*Tí eiga vit aldri at gloyma*</u> og ilt verður at fyrigeva, hvussu flestir menn krokaðu og skulkaðu sær undan ábyrgdini av „kreppuni" í 90 unum og løgdu alla byrðuna á Atla. Hann fekk psykologisku og moralsku *„skyldina"*. Hann gjørdist syndabukkur fyri eitt stórt lið av rædduskítum! Intrigurnar móti Altla og politiska svævingin av honum í 90-unum eru størsta politiska justitsmorðið í føroyskari søgu! Hann tók politisku avleiðingarnar, og sum hann tók til: *„Je havi breiðar herðar og skal nokk taka mína politisku ábyrgd, men um allir teir, sum hava <u>juridisku</u> ábyrgdina av tí, sum fyrifórst, komu fram í ljósið, ja, so hevði verið trongt í geglinum!"* Atli var ikki korruptur og spann avgjørt ikki persónliga gull av tí fíggjarliga meldri, sum herjaði í 80 unum! Hetta eiga serliga yngri javnaðarfólk at leggja sær í geyma, nú nógvir menn *eftirrationalisera*, sum vant, og royna at skriva Føroyasøguna umaftur. Endamálið er, sum tað plagar, at teir vilja útvega sær sjálvum eina betri fortíð! Men eingin teirra kendi sína vitjunnartíð, tá ið á stóð, og eingin stuðlaði Atla, tá ið teir áttu! Alt annað eru retrospektivar kávalótir!

Sum fleiri eldri javnaðarfólk hava sagt hesar seinastu dagarnar: <u>Tað eru nógvir kendir menn, sum í dag prísa seg lukkuligan fyri, at Atli ikki náddi at skriva sínar endurminningar!</u>

## Evstu orð um trúgvan vin

<u>*Noch lebt die alte Treue*</u>
<u>*Noch lebt die treue Alte*</u>

Fyri góðum ári síðani hittust vit í Keypmannahavn og sjálvandi vóru, sum eldri monnum vant nógvar nostalgiskar metingar á lofti um tað stutta mannalívið, men aðaltemaið hjá Atla hetta kvøldið var tað stóra bókaverkið um partamannin og fyrimyndina Jens Otto Krag. Hesar bøkur vóru nýliga útkomnar tá, og lógu við høvdalagið hjá honum! Atli tosaði leingi og hugtikin um, hvussu mætan og stringentan statsmann, hann helt Krag vera, men eisini ein sera einsamallan mann! Hann endurtók fleiri ferðir, hvussu krevjandi, ótakksamur og harður politikkur kann vera fyri privata gerandisdagin og ofta fyri lívið sum heild – hann tosaði kanska ikki bara um Krag!

Tað kvøldið skiltust vit móti midnátt á Valby heyggi við Fasanvegin, har vit so mangan høvdu spákað í yngri árum, og hann vissaði meg fleiri ferðir um, at hann gleddi seg til at lesa bøkurnar lidnar. Tað var helst ikki sørt av symbolikki í, at teir báðir undangongumenninir, sum longu møttust fyri góðari hálvari øld síðani, *„hittust aftur"* á náttborði Atla, og ikki høvdu teir so lítið til felags. Báðir vóru miðvísir í síni lívsstevnu og báðir fingu gjøgnumført og avrikað stóran part av sínum ætlanum. Báðir fingu eisini rættiliga lítla tøkk, meðan teir livdu! Báðir stríddust kompromisleyst móti kommunistisku sóttini! Umenn ymiskir sum fænotypur, vóru báðir kontemplativir av lyndi! Harumframt vórðu báðir mettir sum jarðbundnir teknokratar, men høvdu samstundis potentiellar musiskar gávur!

Flestu fundir okkara vóru eftirhondini *telefonin*! Og hóast tað í skrivandi løtu eru farnir meira enn fjúrtan dagar, síðan Atli andaðist, má eg framvegis leggja bond á meg sjálvan, tí eg refleksivt eri á veg yvir til telefonina og ta fiktivu samrøðuna, *av tí at vit áttu at tosað um hetta ella hatta!* Men nú er alt samskifti bara konjunktivur! Saknið er ræðuligt hjá okkum, sum vóru vinfólk hjá honum, og eg kann ikki ætla, hvussu ringt tað er hjá familjuni.

Tankar mínir eru hvønn dag hjá tær, Sólvá – líkaleiðis hjá Onnu, Peturi og Magnusi. Tit hava mist ófatuligt, og somuleiðis hava Helena og Finnur! Men tit hava hábærsligari og mætari minni enn tey allarflestu!

Lat meg við hesum orðum siga hugdjørvum javnaðarmanni, hollum stríðsfelaga og heiðurligum vini farvæl fyri allarsíðstu ferð!

**Virgar T. Dalsgaard**
*á Pætursmessu,*
*22. februar 2005*

## 80 ára føðingardagar

Í dag, 1. mars, fyllir Martin Tórgarð í Havn 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Í dag, 1. mars fyllir Jóhanna Petersen, Saltnes, 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 5. mars frá kl. 18.30 hjá Ragnhild og Helga, Leitisvegur 44, Saltangará.

## Silvurbrúdleyp

Í dag, 1. mars hava Gurli og Guðjon Egholm, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

Í dag, 1. mars, hava hjúnini Andrea og Jørgen Álvheygg Sørensen silvurbrúdleyp. Andr. Engvej 8, 4291 Ruds Vedby, Danmark.

## Dagurin

**1. mars. Albinus**, deyður ár 550. Abbati og biskupur í Angers í Fraklandi. Varð stutt eftir deyða sín skírdur halgimenni. Navnið merkir *hvítur*.